# Aliringar slitu undir Skarvatanga

## – og knústust við Tjaldavíkshólm

ÓDNARVEÐUR
*Vilmund Jacobsen*

Mikumorgunin boðaði tryggingin Vaktar-og Bjargingartænastuni frá, at seks aliringar hjá Hera Hjelm, sum lógu undir Skarvatanga við norðrara landið, høvdu slitið og vóru farnir at reka.

Tá ið Sosialurin tosaði við Jóhan Simonsen hjá V&B um 10.30-tíðina mikumorgunin, visti hann at siga, at garnabáturin, Ólavur Hvíti, royndi at halda ringunum, so teir ikki rókust fyri vág og vind. Brimil hevði tá sett kós móti Trongisvágsfirði, og Jóhan væntaði, at teir vóru frammi eftir tveimum tímum.

Men alt var ivaleyst til fánýtist.



*Óeydnan hevur enn einaferð verið eftir Hera Hjelm. Her liggja nýggjastu aliringarnir hjá honum í sorli í brim inum á Trongisvágsfirði*

### Alt rak á land

Tá ið undirritaði hevði frætt um, at ringarnir høvdu slitið, ringdi eg til Áka Bertholdsen á redaktiónini í Suðuroy. Tá hevði hann eisini frætt um hetta og var á veg á staðið at taka myndir.

Um 11.30-tíðina frættu vit aftur frá Áka, at allir seks ringarnir vóru riknir á land á molabogan við Tjaldarvíkshólm.

Bæði Grani og Ólavur Hvíti royndu at bjarga ringunum undan at reka á land, men líkindini vóru so ring, at tað eydnaðist ikki. Teir noyddust at gevast. Hann var landnyrðingur og nógvur vindur, og hetta er ring ætt úti á Trongisvágsfirði.

- Allir seks ringarnir liggja nú og veltast í briminum og eru farnir í knús. Reyður litur er byrjaður at síggjast í sjónum, har teir liggja, og hetta er helst blóð frá fiski, sum er farin í knús, sigur Áki Bertholdsen.

Manbjørn í Grund, skipari á Nærabergi:

# Vit roknaðu við einum gjøgnumbroti í vár

**- Kundu vit fiskað tað sama í ár sum í fjør, hevði raksturin givið eitt hampiliga gott yvirskot. Tí kemur tað dátt við, at vit ikki sleppa at fiska í ES-sjógvi í februar og mars, sigur Manbjørn í Grund, sum er heima hendan túrin. Hann hevur tó vónir um, at árið hjá Nærabergi fer at eydnast hampiliga væl kortini, tí prísurin á surimi er hækkaður og oljuprísurin lækkaður**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað eru í hesum døgum liðin júst tvey ár, síðan risatrolarin, Næraberg, fór sín fyrsta túr. Skipið kastaði fyrstu ferð, 28. februar ár 2000 og hevur verið í vinnu síðan. Fíggjarliga hava hetta verið tvey tung ár, men við góðum samstarvi millum føroyingar og norðmenn og ágrýtnum fólki á brúnni, dekkinum og á verksmiðjuni hevur eydnast at havt skipið siglandi. Og nú sær endiliga betri út, hóast torført kann vera at síggja hetta á pappírinum.

Vit hava skift orð við Manbjørn í Grund, skipara, sum fór sín fyrsta túr við Nærabergi í mai ár 2000. Hann fekk fast starv umborð í desember 2000 og hevur í hesum tíðarskeiði skifst við Ólav Biskopstø um at føra skipið. Onkran túr hevur Manbjørn tó loyst av sum stýrimaður. Ein annar, sum eisini hevur ført Næraberg onkran túrin, er norðmaðurin, Jarle Sætre. Hann førdi skipið seinasta túr. Manbjørn og Jarle, sum er royndur skipari, eisini við stórum trolarum, vóru við sama skipi í Alaska árini 1996 og 1997; tá fiskaðu teir Alaska pollok.

Næraberg er nýliga farin avstað aftur, og Ólavur Biskopstø er aftur á brúnni.



### Góð útlit hóast vónbrot

Manbjørn í Grund sigur, at Næraberg helst er farin í altjóða sjógv at royna. Ætlanin var at fara á leiðina vestur úr Írlandi og royna uttanfyri og fram við 200 fjórðinga fiskimarkinum. Har kann saktans vera svartkjaftur at fáa hesa tíðina av árinum. Hann væntar, at hesin túrurin fer at vara ein góðan mánaða.

- Tað kemur ógvuliga dátt við hjá okkum, at vit ikki sleppa í ES-sjógv atroyna í februar og mars, nú samráðingarnar millum Føroyar og ES ikki komu undir land. Í februar, mars og apríl í fjør høvdu vit góðan fiskiskap í ES-sjógvi. Vit gjørdu tríggjar góðar túrar uppá ein mánaða hvør. Høvdu fullar tangar, 770 tons av surimi hvønn túrin. Tann triði túrurin endaði undir Føroyum. Vit kastaðu í føroyskum sjógvi, 12. apríl, og tá var nógvur svartkjaftur at fáa her.

Manbjørn sigur, at tað, sum serliga ræður um hjá Nærabergi í ár, er at fáa nakað burtur úr í altjóða sjógvi í februar, mars og partvís apríl mánaði, nú skipið ikki sleppur at fiska í ES-sjógvi.

- Vit høvdu annars vónað at fingið uppaftur meira burtur úr í ES-sjógvi í ár enn í fjør, tí surimi-framleiðslan umborð gongur nógv betri nú, eftir at broytingar eru gjørdar, og royndirnar við framleiðsluni eru fleiri. Tað var nú, vit roknaðu við einum gjøgnumbroti, og tað var nú, vit roknaðu við, at yvirskotið skuldi koma.

### Mistu tað besta

Manbjørn vísir á, at hevði Næraberg fiskað tað sama í ár sum í fjør, hevði raksturin givið eitt hampiliga gott yvirskot.

- Í fjør vár fingu vit 11-13 kr. fyri kg. av surimi, men í desember fingu vit 15-18 kr. fyri kg. Japanesarar kenna nú betri okkara framleiðslu. Surimi úr svartkjafti var nýtt í teirra verð, men nú hava teir álit á, at vit kunnu levera eina dygdarvøru. Bøtt er eisini um framleiðsluna umborð, og dygdin á surimi er betur. Og samstundis, sum prísurin á surimi sum heild er hækkaður, er oljuprísurin eisini lækkaður. Haraftrat er framleiðslan hjá okkum fyri hvørt samdøgur nú størri enn nakrantíð.

Skiparin sigur, at tað tekur drúgva tíð at fáa japanesarar at trúva, at tú kanst levera eina dygdarvøru, og serliga tá ið surimi úr svartkjafti er lutfalsliga nýtt á japanska marknaðinum.

- Vit harmast um, at vit ikki sleppa í ES-sjógv at royna, tí hesir 2-3 mánaðirnir skuldu verið teir bestu á árinum, sigur Manbjørn, sum tó ikki hevur mist vónina um, at árið 2002 kann gerast eitt hampiliga gott ár hjá trolaranum.

Hann er sera spentur uppá framtíðina.

- Lat okkum vóna, at Næraberg ger ein góðan túr í altjóða sjógvi. Vit kunnu vænta, at svartkjaftur verður aftur at fáa í føroyskum sjógvi í apríl, og tá verða vit ikki raktir av trupulleikunum við ES, sigur Manbjørn í Grund.

*Manbjørn í Grund harmast um, at vit ikki sleppa í ES-sjógv at royna, tí hesir 2-3 mánaðirnir skuldu verið teir bestu á árinum. Hann hevur tó ikki mist vónina um, at árið 2002 kann gerast eitt hampiliga gott ár hjá trolaranum*



# Hann stríðist móti kavanum

**William McKay hevur grivið kava í samfull 20 ár. Mikunáttina var eitt tað ringasta kavaódnaveðrið í langa tíð, og vóru tá aftur boð eftir kavagravaranum, sum longu klokkan fimm á morgni fór í kríggj við tann nógva kavan, ið var niðurkomin fyri, at fólk skuldu sleppa til arbeiðis morgunin eftir**

KAVAGRAVING
*Ingrid Bjarnastein*

Tú sært teir. Ein stór maskina og ein maður. Men hugsar tú um tað? At tað er hesum manni fyri at takka, at tú í tínum heita bili sleppur so at siga turrskøddur til arbeiðis? Meðan tú liggur heitt og fjálgt undir dýnini klokkan fimm um morgunin, so fara kavagravararnir hjá Landsverkfrøðinginum út í kuldan at grava. Og soleiðis er ferð eftir ferð, tá tað er kavi. Kavagravararnir fara upp við hønunum, fyri at vit onnur skulu sleppa til arbeiðis, í skúla, í barnagarð ella hvar nú leiðin gongur. Men tað er nú einaferð soleiðis, at hetta er eitt arbeiði júst sum øll onnur.

William McKay hevur grivið kava í 20 ár. Og kavarokið í gjár hevði við sær, at klokkan 5 fór William út at grava við maskinuni. Tá Sosialurin fekk fatur á honum var hann staddur vestanfyri tunnilin á Norðskála.

– Ja, eg havi grivið kava í 20 ár, og ódnarveðrið í nátt hevur gjørt, at koyrilíkindini í dag eru eini tey ringastu, eg havi upplivað. Líkindini eru stak vánalig, men veðrið er longu batnað munandi. Klokkan er hálvgum tíggju og tað er ikki koyrandi til Gjáar enn, sigur William McKay.

Við tunnilsvegin var kavin tveir til tríggjar metrar tjúkkur, men William væntaði at kavin á gjáarvegnum mundi verða eini fýra, fimm metrar tjúkkur.

### Eitt korter í blindum

Strævið er at grava kava. Serliga fyri høvdið.

– Eg fái lætt høvuðpínu, tá eg gravi kava. Kanska er tað tí, at eg má rættiliga kýta meg fyri at síggja nakað. Tað kann onkuntíð ganga long tíð tá rok er á vegnum áðrenn eg síggi aftur fyri kavaroki. Viðhvørt 10-15 minuttir og onkuntíð uppaftur meira, greiðir William frá.

Men inni í gravimaskinuni er heitt, og William sigur seg ongantíð verða kaldan, tí hann er eisini væl ílætin.

– Og um tú arbeiðir hart, so fært tú eisini sveittan fram! Í gravimaskinuni er eisini ivaleyst av hita, so tað bilar ikki.

William heldur, at bilførarar ofta eru syndarligir, tá tað kemur til at koyra í kava. Hann sigur grundina vera, at kanska tað er tí, at teir leggja ov stórt álit á kavagravararnar og maskinurnar. Men hví soleiðis er, visti William tó ikki rættiliga at greiða frá.

– Men tíbetur er tað sjáldan, at koyrilíkindini eru so vánalig, sum tey eru í dag.

### Ein steðg

Sjálvt um dagurin Williami byrjar við at koyra klokkan fimm um morgunin, so hevur hann so at siga ongan steðg. Hann fær sær ein døgurðabita á middegi, men annars verður koyrt uttan steðg. Og grivið verður heilt til klokkan sjey, átta á kvøldið. Heldur ongin avloysari er, sum loysir William av.

So arbeiðsdagurin hjá einum kavagravara kann verða heilt upp til 15-16 tímar uttan steðg. Men so líðandi og við góðum treysti, væntaði William, at hann fór helst at koma vegin fram til Gjáar innan ikki so heilt leingi.






*William McKay hevur gravað kava fyri Landsverkfrøðingin í 20 ár. Í gjár vóru aftur boð eftir honum, og klokkan 5 byrjaði hann við maskinunum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*